**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 165/2009: Uppskot til samtyktar um játtanarkarmar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2011**

Landsstýrið hevur lagt málið fram tann 31. mars 2010, og eftir 1. viðgerð 8. apríl er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 14., 21., 23., 26. og 29. apríl og 3., 5., 6. og 7. mai 2010.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsbankan, Hagstovuna og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Ein samd nevnd setir fram soljóðandi:

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

Uppskotið verður orðað soleiðis:

"Við hesi løgtingssamtykt tekur Løgtingið undir við, at samlaði útreiðslukarmurin á løgtingsfíggjarlógini fyri 2011 verður 4.754,4 mió. kr. Rakstrarkarmurin er 4.529,4 mió. kr., og løgukarmurin er 225,0 mió. kr. Samlaði inntøkukarmurin verður 4.154,5 mió. kr. Í talvuni niðanfyri eru samlaðu játtanarkarmarnir býttir á greinar soleiðis, sum fyriskrivað er í landsins játtanarskipan.

| **Greinar** (*mió. kr.*) | **Rakstur** | **Løgur** |
|---|---|---|
| § 1 Løgtingið | 44,0 | 0 |
| § 2 Løgmansfyrisitingin | 17,0 | 3,5 |
| § 3 Fíggjarmál | 431,5 | 0 |
| § 5 Fiskivinnumál | 149,1 | 25,0 |
| § 6 Vinnumál | 289,9 | 3,0 |
| § 7 Mentamál | 908,6 | 64,0 |
| § 11 Heilsumál | 875,5 | 49,0 |
| § 12 Almannamál | 1.663,3 | 37,0 |
| § 15 Innlendismál | 109,0 | 43,5 |
| § 16 Uttanríkismál | 41,5 | 0 |
| ***Útreiðslur tilsamans*** | ***4.529,4*** | ***225,0*** |
| **Útreiðslukarmur** | **4.754,4** | |
| | | |
| § 20 Inntøkur | 4.154,5 | |
| **Inntøkukarmur** | **4.154,5** | |
| | | |
| **RLÚ-úrslit** | -599,9 | |

Løgtingið tekur harumframt undir við, at RLÚ hallini á løgtingsfíggjarlógunum árini 2011-2015 minka stigvíst samsvarandi niðanfyristandandi yvirliti:

| | |
|---|---|
| **2011** | - 600 mió. kr. |
| **2012** | - 450 mió. kr. |
| **2013** | - 300 mió. kr. |
| **2014** | - 150 mió. kr. |
| **2015** | 0 mió. kr. |

Løgtingið tekur eisini undir við, at almenni løgukarmurin á løgtingsfíggjarlógunum árini 2011-2015 verður ásettur samsvarandi niðanfyristandandi yvirliti:

| | |
|---|---|
| **2011** | 225 mió. kr. |
| **2012** | 280 mió. kr. |
| **2013** | 275 mió. kr. |
| **2014** | 250 mió. kr. |
| **2015** | 250 mió. kr.” |

\- - - o - - -

Viðmerkingar:
Soleiðis broytt er nevndin eisini samd um, at íkomna búskaparstøðan í landinum, við stórum áhaldandi halli á løgtingsfíggjarlógini, má loysast. Játtanarskipan landsins miðar eftir, at politiska skipanin leggur eina yvirskipaða fíggjar- og búskaparliga ætlan fyri næstu fimm árini, og nevndin er samd um omanfyrinevndu karmar hesi árini, fyri at fáa samfelagið so snikkaleyst gjøgnum kreppuna sum gjørligt.

Viðgerðin í Fíggjarnevndini hevur yvirskipað tikið støði í karmunum í uppskoti landsstýrisins, ið varð lagt fram á ting 31. mars 2010. Uppgávan hjá Fíggjarnevndini á hesum sinni er at taka støðu til karmarnar og ikki at fara niður í smálutir um einstøku játtanirnar. Samtyktin um karmarnar er ítøkiliga útgangsstøðið fyri fíggjarlógargerðini, ið skal vera liðug fyri 1. oktober 2010 og skal tí skiljast sum ein fastlæsing av karmunum í hvørjum ráðsgeira sær, áðrenn telvingin um politiska innihaldið kann byrja.

Nevndin er samd um, at rætt er at stremba eftir javnvág á løgtingsfíggjarlógini í seinasta lagi í 2015, hetta fyri at varðveita vælferðarsamfelagið. Samsvarandi hesi semju er nevndin, sum omanfyri nevnt, vorðin samd um stigvíst at minka hallið á fíggjarlógini eftir hesum leisti:

| | |
|---|---|
| 2011 | - 600 mió. kr. |
| 2012 | - 450 mió. kr. |
| 2013 | - 300 mió. kr. |
| 2014 | - 150 mió. kr. |
| 2015 | 0 mió. kr. |

Á henda hátt metir nevndin, at sleppast kann undan skuldarfelluni, og harvið kann sleppast undan, at rentubyrðan trýstir vælferðina niður.

Neyðugt er at fyribyrgja ringastu avleiðingum av íkomnu støðuni, eitt nú hópuppsagnum í almenna geiranum, við at taka hond um trupulleikarnar í tøkum tíma. Støðan gevur rúm fyri rættstundis umhugsni og lagaligum skifti fyri at stjórna samfelagnum upp á turt aftur. Tess skjótari vit finna javnvágirnar í búskapinum aftur, tess styttri er leiðin til menning og vøkstur.

Nevndin hevur lagt seg eftir at miða eftir javnvágini millum bygnaðarbroytingar, nýggjar inntøkur og tað at tálma vøkstrinum í útreiðslunum. Somuleiðis er semja um fleiri virkisskapandi íløgur, sum omanfyri lýst:

| | |
|---|---|
| 2011 | 225 mió.kr |
| 2012 | 280 mió.kr |
| 2013 | 275 mió.kr |
| 2014 | 250 mió.kr |
| 2015 | 250 mió.kr |

Stóra politiska avbjóðingin komandi árini verður at fremja bygnaðarbroytingar soleiðis, at vit aftur fáa inntøkuvøkstur í samfelagnum, umframt at vit minka um kostnaðin av at reka samfelagið. Núverandi ringu avleiðingarnar av tilfeingiskreppuni í høvuðsvinnu landsins er samstundis møguleikin fyri skjótasta inntøkuvøkstrinum, um rætt verður farið fram næstu árini. Harumframt er neyðugt beinanvegin at fara undir at leggja eina langtíðaríløguætlan, sum helst skal vera búgvin til politiska støðutakan saman við fíggjarlógaruppskotinum í heyst. Miðast skal eftir breiðari semju um langtíðaríløguætlanina, fyri at hon yvirskipað kann virka og røkka yvir um fíggjarár, valskeið og skiftandi samgongur.

Harumframt hava Anfinn Kalsberg og Bill Justinussen hesar viðmerkingar:

Hallið á fíggjarlógini er størsta avbjóðingin, Løgtingið hevur fyri framman. Alneyðugt er at fáa hallið á fíggjarlógini burtur, men samstundis gera tað í eini tilgongd, har samfelagið kann vaksa. Sambært uppskoti landsstýrismansins í fíggjarmálum um fíggjarkarm er hallið í 2015 framvegis 529 mió. kr., og almenna skuldin vorðin alt ov stór. Um ikki fíggjarpolitikkurin verður lagdur í tryggari karmar, er vandi fyri, at Føroyar við tíðini kunnu enda í somu støðu sum Grikkaland. Tí er minnilutin fegin um, at tað er eydnast at fáa samda Fíggjarnevnd at broyta uppskot landsstýrismansins til, at hallið á fíggjarlógini verður burtur í 2015.

Avbjóðingin má vera, at vit stigvíst minka almennu útreiðslurnar, samstundis sum vit føra ein virksemisskapandi politikk. Vit eiga at minka um tað almenna og vaksa um samfelagið. Í broytingaruppskotinum frá Fíggjarnevndini verða almennu útreiðslurnar uml. 20 mió. kr. minni enn í uppskoti landsstýrisins. Hóast minnilutin heldur, at afturhaldið í almenna rakstrinum eigur at vera størri, tekur minnilutin undir við tí. Men harafturat mælir minnilutin landsstýrinum til beinanvegin at fyrireika og fremja bygnaðarbroytingar innan almenna fyrisiting og umsiting, sum kann viðføra enn lægri rakstur á fíggjarlógaruppskotinum, sum verður lagt fram í heyst.

Fyri at inntøkusíðan kann halda og vaksa frameftir, er neyðugt at hava ein virksemisskapandi politikk. Tí er minnilutin fegin um, at eydnast er at fáa semju um ein hægri íløgukarm, enn landstýrismaðurin mælir til. Hóast fyriliggjandi broytingaruppskot hevur íløgurnar býttar út á greinar, eigur landsstýrið beinanvegin at

taka stig til at gera eina langtíðarløguætlan, har allir flokkar eru við. Út frá hesi íløguætlan verða íløgurnar fyri 2011 og árini frameftir raðfestar.

Í uppskoti landsstýrismansins verða stórar rokningar sendar familjum og vinnu. Minnilutin er sannførdur um, at tílík átøk fara at minka um búskapin, og fer væntaði inntøkuvøksturin tí als ikkiat halda. Minnilutin vísir á, at í flestu londum rundan um okkum verða heldur stimbrandi átøk framd. Hetta fyri at skapa ein neyðugan búskaparvøkstur. Minnilutin tekur tí ikki undir við ætlaðu inntøkulógunum hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, men mælir heldur til ein virkisskapandi politikk, sum kann vaksa um samfelagið og harvið eisini um landskassans inntøkur.

Minnilutin (Anfinn Kallsberg og Bill Justinussen) mælir tí til at taka undir við útreiðslukarminum sambært broytingaruppskotinum frá Fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin, 7. mai 2010**

| | | |
|---|---|---|
| Anfinn Kallsberg<br>formaður | Eyðgunn Samuelsen<br>næstformaður | Bjørn Kalsø |
| Magni Laksáfoss | Bill Justinussen | Tórbjørn Jacobsen |

Annita á Fríðriksmørk